Danski professarin, Hanne Petersen um globaliseringmeldurin:

# Grønlendingar eru við í fremstu røð



*Hanne Petersen, professari í rættarsosiologi, heldur, at norðurlendska vælferðarskipanin er við at syngja sítt seinasta vers. Nýggja skipanin fer at leggja seg eftir »forskelsbehandling«, sum hon kallar tað*

**Grønlendingar hava í nógv ár verið mettir at verða eitt rættiliga avskorið land. Hetta er nú við at broytast, tí teir hava ásannað, at teir eru noyddir at luttaka á altjóða leikpallinum. Teir vilja nú seta Grønland so rimmarfast á heimskortið**

SAMRØÐA
*Orð og myndir:*
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í hesum døgum er danski professarin í rættarsosiologi, Hanne Petersen, í Føroyum og roynir at seta seg inn í føroysk samfelagsviðurskifti. Hanne Petersen arbeiðir á Københavns Universitet, har hon hevur fingið eitt sokallað professorat til at viðgera grønlendska rættarsosiologi.

Í samband við professoratið metir hon, at fyri at fáa eina haldgóða viðgerð av evninum, er hon eisini noydd til at seta seg inn í føroysk samfelagsviðurskifti. Hon kom til landið seinasta mikudag, og eftir ætlan fer Hanne Petersen aftur av landinum leygardagin.

Hetta er fyrstu ferð hon vitjar Føroyar, og umframt at gera samrøður við viðkomandi fólk, sum kunnu seta hana í føroysk samfelagsviðurskifti, hevur hon ferðast kring oyggjarnar sum ferðafólk.

## Búð í Grønlandi í fýra ár

Frá 1995 og fýra ár framm búði Hanne Pedersen í Grønlandi. Hon undirvísti á Universitetinum í Grønlandi, og hon hevur skrivað fleiri bøkur um rættar- og samfelagsviðurskifti í Grønlandi.

Í 2001 fekk hon tillutað professoratið um grønlendska rættarsosiologi frá Københavns Universitet, og eftir ætlan skal hon verða liðug við ritgerðina í 2006. Hetta er fyrstu ferð, at Københavns Universitet letur eitt professorat, ið viðger onnur øki í danska ríkinum enn Danmark, so talan er um ein forkunnuga uppgávu hjá danska professaranum.

Í høvuðsheitum ætlar Hanne at lýsa broytingina í samfelag- og rættarviðurskiftum í Grønlandi í hesum globaliseringstíðum. Hon heldur, at túrurin til Føroya er rættiliga nærliggjandi, tí hon hevur áhugað í at síggja um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru øðrvísi enn viðurskiftini millum Grønland og Danmark.

Hon ásannar, at túrurin fyrst og fremst skal nýtast sum bakgrundsvitan til ritgerðina um Grønland, men fyri at kunna gera nakrar samanberingar millum Grønland og Føroyar, var tað týdningarmikið, at hon setti eg gjøllað ínn í føroysk samfelagsviðurskifti.

Hanne Petersen er ógvuliga áhugað í globaliseringshugtakinum, og hon dylir heldur ikki fyri, at júst tað evni verður knútapunktið í uppgávuni. Danski professarin heldur, tað er ógvuliga áhugavert at síggja menningina av grønlendska samfelagnum síðan annan veraldarbardaga.

Stórur partur av tíðini eftir kríggið, hava grønlendingar nýtt til at vinna sær rættindi, fyrst sum amt, og síðan sum heimastýrið, og nú verður arbeitt við at vinna sær rættindi á altjóða leikpallinum.

## Rívandi menning í Grønlandi

Hanne Petersen vísir á, at grønlendingar eru væl á veg til at kunna kalla seg heimsborgarar. Øktu tøknligu-, samskiftis, og ferðamøguleikararnir hava havt við sær at ein hugburðsbroyting er farin fram í Grønlandi. Grønlendingar eru ógvuliga tilvitaðir um, at heimssamfelagið gevur teimum øktar møguleikar.

Hanne Petersen nevnir, at ST-menniskjasáttmálin, broytt hugsjón mótvegis upprunafólki og mikrostatum hevur rættiliga latið eyguni upp hjá grønlendingum. Danski professarin sigur, at grønlendingar hava sum mál at sláa sítt navn rimmarfast á heimskortinum.

Hetta verður gjørt við at broyta hugburðin hjá altjóða samfelagnum mótvegis Grønlandi, og hjá grønlendingum mótvegis altjóða samfelagnum. Fyri at fremja hesa hugburðsbroyting, so verður arbeitt bæði politiskt, búskaparligt og mentanarligt.

Hanne Petersen heldur, tað ber væl til at staðfesta, at Grønland frá at vera rættiliga avskorið, nú er í ferð við at gerast partur av einum heimssamfelagið. Sambært danska professaranum, so er serliga tann tøkniliga menningin, ið hevur gjørt sítt til tí rívandi menningina í Grønlandi.

Hon vil fara so langt at siga, at grønlendingar eru møguliga eru í fremstu røð, tá tosað verður um at síggja seg sum borgara í einum heimi undir menning. Hon nevnir tey lesandi í Grønlandi, sum veruliga eru farin ígjøgnum eitt mentalitetsbroyting frá at verða statsborgari í Grønlandi til at kunna kalla seg heimsborgarar. Mentalitetsbroytingin heldur hon verða hugvekjandi, tí fólk eru vanliga rættiliga trek at góðtaka, at tey alt meira gerast heimsborgarar, og harvið nationala festið.

Spurd um rákið rakar allar grønlendingar, ella talan bert er um tey lesandi, svarar Hanne, at tað rakar øll.

– Tann vanligi maðurin í Grønlandi, sum fiskar er noyddur at fyrihalda seg til prísirnar á heimsmarknaðinum, og er prísurin ikki góður, so rakar tað øll húsarhaldini. Grønlendingar eru noyddir at síggja seg ein part av eini størri heild, og tað gera teir eisini. At búskapurin í Grønlandi er so lítil og sárbærur og lættur at ávirka, hevur við sær, at heimsstøðan rakar skjótt, greiðir Hanne Petersen frá. Sammett við støðuna aðrastaðni í heiminum, er støðan í Grønlandi serlig. Vanliga hoyrist, at fólk eru bangin fyri at missa seg sjálvan burtur í øllum globaliseringsmeldrinum. Serliga er óttin vendur ímóti at so stórir felagsskapir sum ES, NAFTA, WHO os.fr. gera, at national statirnir sum eind dettur burturímillum stóru altjóða eindirnar.

Menningin ímóti størru eindum sum ES, hevur havt eitt mótrák við sær, sum heldur, at tað er av stórum týdningi at national statirnir sum eind verða varðveitt. Men hetta vinnur kortini ikki frama í Grønlandi.

Grønlendingar eru sera opnir fyri útheiminum, og eru sera forvitnir at fregnast um, hvat útheimurin hevur at bjóða teimum. Teir hava ásannað, at fyri at yvirliva í dag, so er neyðugt at ein er opin fyri útheiminum. Sambært Hanne Pedersen, so síggja grønlendingar tað nærmast sum ein yvirlivilsishátt at vera opnir fyri samstarvsmøguleikum við útheimin.



*Grønlendingar eru rættiliga tilvitaðir um, at teir eru partir av einum størri globalum heimi. Teir fegnast um øktu tøknu-, samskiftis- og ferðamøguleikarnir, globaliseringin hevur havt við sær*

## Nýtt rák vinnur fram

Tekur ein orðini hjá Hanne Petersen fyri fult, so er vælferðarskipanin, sum serliga hevur vunnið fram í Norðanlondum við at syngja sítt seinasta vers. Skipanin, ið kemur at loysa vælferðarskipanina av, verður sambært Hanne Petersen ein skipan, ið fer at leggja seg eftir at ganga øðrvísi um bólkar, ið ein ella annan hátt eru øðrvísi í einum samfelag.

Henda skipan er við vinna fram millum sosiologar í dag. Hetta nýggja rákið skal síggjast í ljósinum av teimum rættindum, ymisku bólkarnir hava vunnið sær seinastu 25 árini. Hon nevndir menniskjarættindi, diskriminati-on ímóti kyn, rasu, og átrúna os.fr.

Ein broyting fer at fara fram í hugsunnarháttinum hjá fólki, frá at øll skulu standa líka verður farið til, at hvør bólkur sær krevur serliga viðferð. Fyri at henda skipan skal vinna frama, so er neyðugt, at samfelagið ásannar, at samfelagið í dag er fjølbroytt samansett

Í Danmark eru tað bæði fólk, ið eru fyri og ímóti nýggja rákinum. Hon tekur spurningin um mongu innflytararnar í Danmark. Her hevur tó eitt fólk sum er øðrvísi enn danir, og tað hevur óvissu við sær millum fólk.

Multikulturiseringin er partur av nýggja rákinum. Ein er noyddur til at ganga øðrvísi um innflytararnar, tí teir kunnu lúka somu treytir sum danir. Tað er týdningarmikið hjá politiska myndugleikanum at ásannað at felagið er samansett av nógvum ymiskum bólkum, og politikkurin verður orðaður eftir tí veruleikanum.

Seinasta fólkatingsval er gott dømi, at rákið er vinna fram politiskt. Tveir innflytarar vórðu valdir á Fólkating, og tað heldur danski professarin verða greitt tekin um, at danir eru við at síggja nýggja rákið. Hon nevnir í sama viðfangi, at á skúlaøkinum í Danmark eru eisini broytingar at hóma. Bæði í donskum fólkaskúlum og studentaskúlum hevur man ásannað, at flokkarnir í størri og størri mun eru multikulturellir, og tískil verða skipanir settar í verk, ið hóska til tann flokk ella skúla, ið man hevur við at gera.

